VIÐMERKINGAR

Hugsið um at prýða skýlið

Helgo Finn Larsen

Helgo Finn Larsen sum ungur fótbóltsspælari

Nú fer fótbóltskappingin skjótt at byrja aftur, og fótbóltsspælarar kring alt landið eru farnir undir venjingarnar til komandi kappingarár.

Hetta er strævin tíð hjá spælarunum, tí venjingin má takast í stórum álvara, skulu teir koma í rætta formin til dystirnar.

Norðoyingar hava stóran áhuga fyri ítrótti, og ikki minst er tað fótbólturin, sum dregur nógv fólk – bæði spælarar og áskoðarar. Ein orsøk til hetta er helst, at KÍ er eitt felag, sum hevur vunnið nógv gjøgnum árini, og KÍ er eisini tað felagið, sum hevur vunnið flest FM-heiti í fótbólti.

Seinasta FM-heitið var í 1999, men áðrenn hetta vóru 16 onnur meistaraheiti vunnin til býin. Fyrstu ferð KÍ rættiliga vann seg upp á tindin var í 1942, tá rættiligt lív aftur kom í ítróttin í Føroyum.

Skipað varð fyri landskapping í fótbólti, og sjálvandi var KÍ eitt av feløgunum sum var við. ÍSF tók stig til hesa kapping.

KÍ skuldi fyrst spæla ímóti EB og HB, og KÍ vann allar dystirnar so ruddiliga. Størsti sigurin var ímóti KÍ í Klaksvík, her sigurin gjørdist heili 9-0. KÍ vann síðani á Sandavági í hálvfinaluni, og finalan, sum var spæld í Havn ólavsøkudag, endaði við 4-1 til KÍ. Sakaris Lydersen gjørdi trý av málunum hjá KÍ hendan dagin, og Emil Mikkelsen gjørdi eitt mál.

Eisini tennis

Í 1945 spældi eg við á 2. liði hjá KÍ, og føroyameistaraskapin hetta árið. Í 1948 var eg við á 1. liði hjá KÍ, sum vann meistaraskapin. Hetta vóru stuttligar og hugaligar løtur sum fótbóltspælari.

Eg spældi fótbólt frá 1945 og langt upp í fimtiárini. Eg hevði eisini arbeiði, sum kravdi nógva tíð, og tí vóru umstøðurnar ikki altíð tær bestu til at spæla fótbólt.

Klaksvíkingar gjørdu eisini nógv við tennis, og har var eg eisini við. Fyrstu ferð kappast var um meistaraskap í tennis var í 1943, tá Havnar Tennisfelag og Klaksvíkar Ítróttarfelag kappaðust. KÍ vann dystin 2-1, og á liðnum vóru eisini beiggi mín, Jonhard Larsen, Franklin Ziska og Hákun Djurhuus.

Í 1972 vann KÍ eisini eitt minniligt meistaraskap, tí tað var tað 15. í røðini.

Franklin Ziska var við til at vinna KÍ fyrsta meistaraskapin í tennis í 1943

Avgerandi dysturin var ímóti HB í Havn, og hann endaði við javnleiki 1-1, sum var nóg mikið hjá KÍ. Málið hjá KÍ skoraði Eiler Jacobsen.

John Reid Bjartalíð syrgdi í 1954 fyri, at KÍ fekk 50 ára minnisrit. Í 2004 verður KÍ 100 ár, og mítt ynski er, at nevndin í KÍ tekur stig til, at søgan hjá felagnum hesi 100 árini kemur í bók í 2004. Tað hevði verið virðiligt fyri felagið og tey fólkini, sum hava havt við felagið at gera.

Prýðið skýlið

Vónandi fer KÍ at standa seg væl í landskappingini í ár, og vit kunnu fegnast um, at nú er nýtt skýlið umsíðir komið upp at standa við fótbóltsvøllin. Í meiri enn 10 ár hevur einki skýlið verið við fótbóltsvøllin, og stórur saknur hevur verið í hesum.

Tað er tí eitt frálíkt tiltak, sum KÍ, kommunan og onnur hava tikið stig til, og tað er einki at ivast í, at tað verður til stóra gleði hjá fótbóltsáhugaðum norðoyingum.

Eg havi hug at gera eina viðmerking til bygningina, og tað er, at eg vóni, at stóri veggurin, sum vendir omaneftir móti vegnum, kann verða prýddur.. Ikki við plakatum ella lýsingum av ymsum slagi, men við onkrari list ella myndum.

Áhugafelagið hjá KÍ og fólk í býnum annars áttu at komið við hugskotum um, hvussu skýlið kann prýðast, tí tað eru uttan iva nógvir áhugaverdir møguleikar.

Ein møguleiki er at lata ein ella fleiri av okkara listafólkum prýða veggirnar við onkrum verkum. Møguligt er eisini at brúka myndir av einstaklingum, sum hevur havt týdning í okkara samfelag gjøgnum tíðirnar. Tað eru ivaleyst eisini minniligar myndir og hendingar í søguni hjá KÍ, sum kundi verið brúktar í hesum samanhangi.

Í hvussu er vil eg vóna, at gráu betongveggirnir verða prýddir við onkrum av hesum, so býurin kann fáa enn størri gleði av skýlinum.

KÍ vann fyrsta meistaraskapin í fótbólti í 1942. Á liðnum vóru aftan frá vinstru: Franklin Ziska, Kristian Eliasen, Niels Jacob Jensen, Sakaris Lydersen, Sofus Mikkelsen, Mourits Jacobsen, Jacob Meinhard Joensen, Benadikt Baldvinsson. Sitandi: Jonhard Larsen, Petur Andreasen, Sam Jacobsen og Emil Mikkelsen

2. lið hjá KÍ, sum vóru føroyameistarar í 1945. Standandi frá vinstru: Rasmus Jacobsen, Larus Jacobsen, Steingrím Joensen, Fríman Baldvinsson, Franklin Ziska, Hákun Joensen, Hans Andreas Eliasen, Helgo Finn Larsen, Karl Justesen, Jógvan Klakkstein og Harry Don Jacobsen. Brøðurnir Edvin og Albin Johannesen vanta á myndini

KÍ VANN SÍTT 15. MEISTARA-SKAP

Sosialurin leygardagin/Sólekkis drivaði 14. september, tá KÍ vann FM-heitið í 1972

Ætlar Fynd at svara

Fyri Hesuferð
Kjartan Hoydal



Hesuferð hevur í einum brævi til bløðini um skiftistíðina stutt nortið við meiningarkanningarnar, sum verið hava. Hetta var sagt: Í Hvítubók segði ein av útrokningunum, at við fimtan ára skiftistíð bar til at niðurdaga bløkkin uttan at henda tilgongd fekk avleiðingar fyri vælferðina ella fylgjur fyri samfelagsbúskapin sum heild. Illa undirbygdar meiningakanningar gjørdu síðani, at hetta áramálið – fimtan ár – fekk alt ov stóran politiskan týdning.

Fynd, sum ger hesar kanningar, átalaði beinanveg orðalag. Hesuferð sendi síðani bløðunum bræv 8. februar við hesum spurningum:

1. Hevur Fynd eina mannagongd, sum rættar fyri teimum frávikum, „bias", sum eru í sambandi við meiningakanningar, serliga tær um telefonina? Víst verður til tilfar úr øðrum londum um munin millum spurnarblaðskanningar og telefonkanningar, trupulleikan um øll ikki svara og annað mangt.

2. Nýtir Fynd "kontrolspurningar" fyri at eftirkanna um fólk hava skilt spurningarnar rætt?

3. Hevur Fynd eina útrokning av óvissuni við kanningunum ("konfidensinterval")?

4. Metir Fynd um spurningarnar og møguleikarnar fyri at fáa álítandi svar sum lýsa eina gongd, ella er tað "kundin" (almennu fjølmiðlarnir og tey stóru bløðini) sum einsamallur avger hvussu spurningarnir skulu vera.

Fynd hevur enn ikki svarað hesum spurningum, sum mugu haldast hava stóran almennan áhuga.